# Olja rennur út í Løkin í Runavík

**Runavíkar kommuna hevur í longri tíð roynt at funnið út av, hvør orsøkin er til, at olja í nakrar vikur er likin út í Løkin, sum er áin, ið rennur oman úr Toftavatni og oman í Runavíkina**

OLJULEKI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá blaðmaður á Sosialinum av tilvild gekk fram við Løkinum í Runavík, sá hann, at olja – at síggja til – í stríðum streymi rann omaneftir ánni. Vatnið í ánni var rættiliga litað av olju, og tú hugsaði, hvussu hetta kundi bera til.

Á løgreglustøðini í Runavík søgdu tey, at oljulekin ikki er nakar nýggjur trupulleiki, men at hetta hevur verið skilið í nakrar vikur.

- Leitað hevur verið eftir, hvaðani oljan stavar, men enn er ikki funnið fram til kelduna til oljudálkingina í ánni, søgdu tey.

Í morgun hevur Sosialurin vent sær til Sunleiv Højgaard, sum er brunaumsjónarmaður hjá kommununum við Skálafjørðin.

Vit skiltu á løgregluni, at Sunleiv er maðurin, sum hevur roynt at hildið oljuni uppi á landi, so hon ikki rann út í Runavíkina, hagar áin rennur oman.

Sunleif ásannar, at oljulekin í Runavík er einar 3-4 vikur gamal, og at tað hevur verið alt annað enn nøkur løtt uppgáva at loysa málið.

- Oljan kemur oman úr bygdini, men vit vita ikki, hvaðani hon stavar. Tey, sum eiga oljuna, vita heldur ikki av lekanum.

Brunaumsjónarmaðurin sigur, at talan helst er um, at ein niðurgrivin oljutangi ella oljurør er farið at leka, og síðan rennur oljan helst undir onkrari steinseting.

- Vit hava gjørt nógv fyri at loysa málið, og Runavíkar kommuna hevur eisini sent brøv til húskini uttanfyri rundkoyringina, har kommunan hevur biðið fólk kannað eftir, um tey kanska hava varhugan av, at oljan minkar óvanliga skjótt í tanganum.

Sunleiv sigur, at hann eisini hevur vent sær til oljufeløgini, sum eru veitarar í økinum.

- Vit hava biðið tey siga okkum frá, um tey leggja til merkis, at okkurt hús í økinum er farið at brenna ovanliga nógva olju.

## 300-400 litrar

Brunaumsjónarmaðurin sigur, at tá oljan í ánni er litað, merkir tað, at talan er ikki um so stórar nøgdir, sum tað sær út til at vera.

- Vit hava roynt at ansað eftir, at olja ikki er farin við ánni og omaná sjógvin, og hetta hevur eydnast rímiliga væl.

Sunleiv Højgaard ásannar, at oljulekin í Runavík er ógvuliga keðiligur, og hann vónar, at funnið verður fram til lekan skjótt.

- Eftir tí, sum vit higartil hava tikið upp, vil eg meta, at einir 300-400 litrar av olju tilsamans í hesum tíðarskeiði eru farnir í ánna, sigur brunaumsjónarmaðurin.



*Tað sá ikki so tespiligt út í Løkinum í Runavík fríggjadagin, har oljan er runnin í ánna seinastu vikurnar – uttan, at nakar veit, hvaðani oljan stavar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*




**SUZUKI GRAND VITARA 2.5 BENS.** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** NA 753 **Km:** 48.000
**Árgangur:** 26.07.2005
**Útgjald:** 36.250 **Mðr. gjald:** 2.273 (5 ár)
**kr. 145.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 SEDAN** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** MN 261 **Km:** 12.000
**Árgangur:** 01.06.2007
**Útgjald:** 46.300 **Mðr. gjald:** 3.000 (5 ár)
**kr. 185.000,-**



**TOYOTA RAV 4 2.0 VVT-I 4X4** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** JG 132 **Km:** 55.000
**Árgangur:** 03.02.2005
**Útgjald:** 52.000 **Mðr. gjald:** 3.310 (5 ár)
**kr. 208.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1.8 STC. SOL** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** LM 312 **Km:** 71.000
**Árgangur:** 24.03.2004
**Útgjald:** 38.750 **Mðr. gjald:** 3.755 (3 ár)
**kr. 155.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1.6 TERRA H/B** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** EU 817 **Km:** 63.000
**Árgangur:** 22.12.2006
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 2.428 (5 ár)
**kr. 156.000,-**



**PEUGEOT 1007** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** UH 547 **Km:** 29.000
**Árgangur:** 09.03.2006
**Útgjald:** 27.000 **Mðr. gjald:** 1.750 (5 ár)
**kr. 108.000,-**



**TOYOTA AURIS 1.6 LUNA** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** BS 075 **Km:** 7.000
**Árgangur:** 21.05.2007
**Útgjald:** 46.000 **Mðr. gjald:** 2.868 (5 ár)
**kr. 184.000,-**



**HONDA CIVIC 1.6 SEDAN**
**Skrásetingarnr:** MB 923 **Km:** 89.000
**Árgangur:** 09.08.2003
**Útgjald:** 21.250 **Mðr. gjald:** 2.109 (3 ár)
**kr. 85.000,-**



**TOYOTA COROLLA 2.0 D-4D DIESEL** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** HA 241 **Km:** 63.000
**Árgangur:** 14.12.2004
**Útgjald:** 33.000 **Mðr. gjald:** 2.064 (5 ár)
**kr. 132.000,-**



**AVENSIS 2.0 D-4D TERRA DIESEL** 6 mánaða garanti
**Skrásetingarnr:** JK 958 **Km:** 90.000
**Árgangur:** 25.06.2003
**Útgjald:** 39.500 **Mðr. gjald:** 3.840 (3 ár)
**kr. 158.000,-**

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipan, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eyðsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
**Kom og vitja okkum – landsins fremstu bilasølu.**

Brúktir bilar við
**lagaligari fígging**

**REYNI SERVICE** P/F
Vegurin Langi · Hoyvík · Tel 353040 · Fax 353041
Við Borðoyavík · Klaksvík · Tel 473040 · Fax 473041
T-postur: rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo